gult cyan magenta svart



## DAGSINS MEINING

### Hurlivasi í samgonguni

Politiska støðan er rættiliga ógreið, eftir at Anfinn Kalsberg, løgmaður, í síðstu viku saðlaði um, slepti ætlanini um fólkaatkvøðurnar og í staðin skeyt upp at yvirtaka málsøki eftir heimastýrislógini.

Vit vildu sagt, at støðan er ógreið, men formenninir í hinum landsstýrisflokkunum skíra ta nýggju støðuna, sum hevur tikið seg upp fyri »politiskt kaos« og at »Føroyar eru í undantaksstøðu«. Tí kunnu vit ikki siga annað, enn at samgonguflokkarnir fara illa við síni egnu samgongu. Hvat skal so restin av Føroya fólki halda?

Satt at siga, so virkaði løgmaður ikki serliga sannførandi, tá hann boðaði frá 1. februar, at vit skulu hava tvær fólkaatkvøður. Eina 26. mai um sjálvstýristilgongdina, og eina fólkaatkvøðu um fullveldistøkuna um 12 ár. Men nú er greitt, at Tjóðveldisflkkurin kroysti løgmann til hesa støðutakanina - meira ella minni.

Eygleiðarar vistu jú, at Fólkaflokkurin var ikki serliga fegin um hesa ætlanina hjá løgmanni, tá hann boðaði frá henni 1. februar, og haraftturat søgdu øll tekin í sól og mána, at danska stjórnin fór ikki at góðtaka eina 12 ára langa skifistíð. Og hesin illgruni var eisini váttaður fimm dagar seinri, tá forsætismálaráðharrin boðaði frá, at tann búskaparliga skiftistíðin verður bara 4 ár.

At Fólkaflokkurin - og helst eisini Sjálvstýrisflokkurin - fekk kaldar føtur, roknaðu tey flestu við. Men kortini varð hildið, at tá nú løgmaður langt um leingi hevði fngið samgonguna at semjast um ein nýggjan leist, fór hann at halda seg til hann. Og tað skuldi merkt, at vit fóru til eina fólkaatkvøðu tann 26. mai. Líka mikið, hvat ein veljarakanning segði.

Men »føturnar vóru so kaldar og vátar«, at løgmaður legði av sínum eintingum eina nýggja kós. Enn er ikki greitt, nær samgonguflokkarnir fingu boðini at vita, men tað tykist greitt, at teir vistu um ætlanina í fleiri dagar, áðrenn nýggja kósin hjá løgmanni varð kunngjørd.

Staðfestast kann, at henda kósin er meiri realistisk - ella pragmatisk - og eisini skuldi verið møguligt at fingið fleiri flokkar at tikið undir við hesi ætlanini. Men fyri tey fullveldissinnaðu man nýggja støðan vera hugstoytandi, eins og hon er aftur eitt dømi um, at Fólkaflokkurin svíkur víðgongda sjálvstýrispolitikkin, tá á stendur.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Maersk Air 30 ár í Føroyum**



petur & petur • 320870

**Flúgv fyri næstan sama prís sum fyri 30 árum síðani..!**

**Føroyar - Keypmannahavn tur/retur** *)
TILBOÐ
**1500,-**
+ ferðaavgjald á 365,- kr.
**Børn 2-11 ár: -50%**

**Føroyar - Billund tur/retur** *)
TILBOÐ
**1500,-**
+ ferðaavgjald á 403,- kr.
**Børn 2-11 ár: -50%**

Maersk Air hevur 1. mars í ár havt rutu millum Føroyar og Danmark í 30 ár. Og tað hátíðarhalda vit við at lækka prísirnar á okkara ferðum. Til og við 1. apríl ber til at ferðast við Maersk Air millum Føroyar og Danmark fyri lágprís. Einastu treytir, at fáa bíligar ferðaseðlar, eru vanligar apex-treytir, umframt at minst tvey skulu ferðast saman.

***Hoyr nærri um teir bíligu ferðaseðlarnar frá Maersk Air á tíni ferðaskrivstovu...***

**) Ferðaseðlarnir skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan. Broyting av bílegging kann ikki gerast. Ferðaseðilin kann ikki endurrindast. Ferðatíðarskeiðið skal fara um leygardag og sunnudag. Minst tvey skulu ferðast saman.*

**MAERSK AIR**

### Lisbeth L. Petersen 62



Í dag verður Lisbeth L. Petersen, løgtingskvinna Sambandsfloksins 62 ár. Lisbeth er dóttir Rachel og Georg Lindenskov Samuelsen, og hon er gift við Jákup Petersen av Signabø.

Lisbeth er tók realprógv í Havn í 1955. Studentsprógv frá Bagsværd Kostskole og Gymnasium í 1958.

Hon hevur verið húsmóðir og projektleiðari á Føroya Fornminnissavni.

Lisbeth L. Petersen varð vald í Tórshavnar býráð í 1984 og sat hon har til hon ikki stillaði uppaftur við seinasta býráðsval 22. november í fjør.

Árini 1985-93 var hon fyrsti næstformaður í býráðnum.

Eftir býráðsvalið í 1992 gjørdist Lisbeth L. Petersen fyrsti kvinnuligi borgarstjórin í Havn. Tá skipaði Sambandsflokkurin samgongu saman við Javnaðarflokkinum og Tjóðveldisflokkinum. Men eftir býráðsvalið í 1996 skipaðu báðir samstarvsflokkar hennara samgongu saman við Fólkaflokkinum og valdu Leiv Hansen úr Tjóðveldisflokkinum til borgarstjóra.

Listbeth L. Petersen var einsamøll vald í býráðið fyri Sambandsflokkin í 1984, og var flokkurin hennara politiskt sera veikur í býráðspolitikki. Men nú hon gavst í fjør var flokkur hennara ferfaldaður, og hevur Sambandsflokkurin nú fýra umboð í Tórshavnar býráð

Lisbeth L. Petersen varð fyrstu ferð vald á ting fyri Sambandsflokkin í 1990.

**Tøkk**

Øllum teimum, sum sýndu samkenslu, tá kæri maður, pápi og abbi okkara

**Marner Simonsen**

andaðist og varð jarðaður, takka vit hjartaliga.

Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Reyða Kross.
Tøkk fyri alla hjálp.

Tøkk fái Bjarni Bæk, dómpróstur, fyri beinasemi og góð orð.

**Anna, Malan og Jóna**

gult cyan magenta svart



# Heini O. Heinesen: Ongin loysn at slíta samgonguna

**– Okkara fremsta uppgáva verður nú at forða fyri, at ein nýggj avtala verður gjørd við danir, har Føroyar ikki fáa fullveldi, sigur Heini O. Heinesen, formaður tjóðveldisfloksins á tingi**

FULLVELDI
*Áki Bertholdsen*



*– Uppskotið, sum Fólkaflokkurinnú hevur lagt fyri samgonguna, er verri enn heimastýrislógin, sigur Heini O. Heinesen*

– Tað er ongin loysn at slíta samgonguna. Tað verður ikki nýval kortini.

Heini O.Heinesen, formaður tjóðveldisfloksins á tingi, sigur, at flokkurin fer ikki at slíta samgonguna, hóast niðurstøðan er, at Fólkaflokkurin hevur grovliga brotið tær avtalur sum eru gjørdar um fullveldistilgongdina.

Hóast samgongan hevð gjørt av, at fólkaatkvøða skuldi vera um fullveldistilgongdina tann 26. mai, hevur fólkaflokkurin nú givið eftir fyri trýstinum frá donsku stjórnini og hevur boðað frá, at hann vil ikki hava eina fólkaatkvøðu.

Ístaðin hevur fólkaflokkurin lagt eitt nýtt uppskot fyri samgonguna um eina skipan ímillum Føroyar og Danmark,sum líkist rættiliga nógv uppskotinum hjá javnaðarflokkinum.

– Tað uppskotið er uppaftur verri enn heimastýrislógin, tí sambært tí, skal skal Løgtingið viðurkenna danskan yvirvaldsrætt í Føroyum, sigur Heini O. Heinesen.

Hann sipar serliga til punkt tvey í uppskotinum hjá fólkaflokkinum, sum sigur, at øll málsøki, uttan tey, ið eru tengd at yvirvaldsrætti ríkisins, skulu kunna yvirtakast uttan samráðingar. (Undirstrikingin er okkara. Vit prenta nýggja uppskotið frá fólkaflokkinum aðrastaðni í blaðnum).

– Tí kann tjóðveldisflokkurin ikki góðtaka uppskotið, tí hetta er tað sama sum at staðfesta yvirvald ríkisins og tað fer tjóðveldisflokkurin aldrin at gera

Hann sigur, at Tjóveldisflokkurin er ikki sørt skelkaður av, at Fólkaflokkurin skuldi fremja eitt so stórt brot av avtalurnar, sum eru gjørdar.

– Vanlukkan er, at vit hava fráboðað eina fólkaatkvøðu. Tí er tað ómetaliga óheppið, at Løgmaður nú vísir veikleikar alment, og bakkar.

Men tað skilst á Heina O. Heinesen, at tjóðveldisflokkurin ætlar sær ikki úr samgonguni kortini.

– Løgmaður hevur gjørt greitt, at tað verður ikki val nú, hóast samgongan skrædnar. Okkara fremsta uppgáva verður tí at forða fyri, at føroyingar ikki gera eina avtalu við danir, har vit siga yvirvaldsrættin frá okkum og lima okkum inn í danska ríkið.

– Tað hevði verið ein loysn, sum vit undir ongum umstøðum høvdu kunnað góðtikið.

Sostatt vil tjóðveldisflokkurin av øllum alvi royna at forða fyri, at avleiðingin av øllum hesum verður, at samgongan verður umskipað so at javnaðarflokkurin kemur upp í hana, ístaðin fyri tjóðveldisflokkin.

– Hendir tað, verður uttan iva ein avtala gjørd við danir innanfyri ríkisfelagsskapin og so er sjálvstýrismálið tapt í langa, langa tíð framyvir, sigur formaðurin í tjóðveldisflokkinum í tingi.

– Tí er tað avgjørt ongin loysn hjá okkum at fara úr samgonguni, tí so koma vit at sita í andstøðu – og har fáa vit so slett onki gjørt, leggur hann afturat.

Hann sigur, at hevði Løgmaður tikið avleiðingarnar av einum samgongusliti og hevði útskrivað løgtingsval, hevði støðan verið øðrvísi. Tað hevði verið ærligari av Løgmanni at viðgingið, at Fólkaflokkurin tekur ikki undir við fullveldinum.

# Nýggja uppskotið hjá Fólkaflokkinum

**Fólkaflokkurin hevur lagt eitt uppskot í sjey punktum fyri hinar báðar samgonguflokkarnar um viðurskiftini ímillum Føroyar og Danmark skulu skipast**

Eftir at fólkaflokkurin er lopin frá avtaluni um fólkaatkvøðu í sambandi við fullveldismálið, hevur hann lagt eitt nýtt uppskot fyri hinar báðar samgonguflokkarnar um, hvussu farast skal fram hereftir.

Talan er um eitt uppskot til samtyktar, sum skal leggjast fyri Løgtingið og ætlandi samtykkjast har.

Uppskotið er í sjey punktum, sum vit prenta niðanfyri

1. Heitt verður á Landsstýrið um at arbeiða fyri at gera djúptøknar broytingar í viðurskiftunum Føroya og Danmarkar millum við øktum føroyskum sjálvstýri fyri eyga.
2. Øll málsøki utten tey, ið eru tengd at yvirvaldsrætti ríkisins, skulu kunna yvirtakast uttan samráðingar.
3. Lóggávuvald og umsitingarvald í yvirtiknum málum kann ikki verða skert ella tikið aftur.
4. Heimildirnar hjá landsstýri og løgtingi í uttanríkismálum verða víðkaðar til í minsta lagi at umfata altjóða sáttmálagerðir viðvíkjandi yvirtiknum málum og meðavgerðarrætt í øllum málum, ið viðvíkja Føroyum.
5. Heildarveitingin úr Danmark verða minkað eftir skipaðari ætlan, til veitingin er dottin burtur eftir avtalaðum áramáli.
6. heitt verður á Landsstýrið um at arbeiða fyri yvirtøku av hesum málsøkjum frá 1. januar 2002 at rokna:
   - Skúlamál, og gera tilsvarandi tillaging í blokkinum
   - Revsirættarmál, persónsrættarmál, húsfólkarættarmál, arvarættarmál og fíggjarrættarmál
   - Havumhvørvisvernd
   - Vága Floghavn
   - Kirkjumál
7. Ein búskapargrunnur verður settur á stovn, ið skal tryggja Føroyum eina trygga gongd frá studningsbúskapi til sjálvberandi búskap



*Ístaðin fyri fólkaatkvøðu um fullvelismálið, vil Anfinn Kallsberg, Løgmaður, nú heldur hava, at eitt annað uppskot verður lagt fyri Løgtingið um, hvussu farast skal fram hereftir*